## Hans Enoksen hóttur eftir lívinum

Ein 20 ára gamal maður hótti leygardagin við at myrða grønlendska landsstýrisformannin. Hans Enoksen var á veg til hús frá einari jarðarferð leygardagin, tá ein ungur maður tók í bringuna á honum og hótti hann eftir lívinum. Maðurin var ikki vápnaður. Løgreglan í Nuuk tók seinni mannin, sum varð varðhaldsfongslaður aftan á grundlógaravhoyring í gjár. Hans Enoksen sigur við grønlendska kringvarpið, at hann hevur fingið mangt oman yvir sín kropp, síðani hann fór upp í politikk, men at hetta er fyrstu ferð, at hann er hóttur eftir lívinum. Tann 20 ára gamli hótti eisini við at beina fyri landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Per Bethelsen.



## USA endurskoða Kuba-politikkin

Nógv bendir nú á, at USA fer at endurskoða sín politikk mótvegis grannanum Kuba. Richard Luger, sum er oddamaður hjá republikanarunum í uttanríkisnevndini hjá Senatinum, segði í gjár, at hann tekur undir við størri samstarvi og samhandli við Kuba. Eitt nú heldur hann, at Kuba eigur at sleppa at keypa matvørur úr USA upp á borg. USA setti handilstiltøk í verki ímóti Kuba í 1961, men Barrack Obama, forseti, hevur sagt, at tíðin er komin til at endurskoða støðuna.

# Ikki eitt kis um barsilsskipanina

**Hvussu gongst við ætlanunum um at leingja barnsburðarfarloyvið upp í 1 ár, spyr tingkvinnan, Bergtóra H. Joensen, landsstýrismannin í vinnumálum**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í fyrispurningi, sum Bergtóra H. Joensen, tingkvinna hjá Tjóðveldi, hevur sent Jóhan Dahl, landsstýrismanni í vinnumálum, til tingfundin mikudagin, vísir hon til samgonguskjalið, har tað stendur, at: "Barsilsskipanin skal framhaldandi betrast fyri foreldrini og gerast smidligari. Miðast skal ímóti, at hon verður longd upp í eitt ár".

Tingkvinnan greiðir í fyrispurninginum frá, at barnsburðarfarloyvið bleiv longt við 8 vikum undir CHE-samgonguni.

- Tað er at fegnast um – ætlanin var at halda áfram, so barnsburðarfarloyvið loksins gjørdist eitt ár. Vit hava tíverri ikki hoyrt eitt kis um hetta, síðani ABC skipaði samgongu, sigur hon.

Eisini undrast hon á, at samgonguskjalið sigur, at barsilskipanin framhaldandi skal betrast fyri foreldrini.

- Ein kann spyrja, um hon ikki eisini skal betrast vegna børnini og teirra tørv.

Vinnumálaráðharrin hevur seinastu vikurnar verið á rundferð í Føroyum við javnstøðunevndini. Bergtóra H. Joensen heldur, at tað hevði verið áhugavert at hoyrt, um hann á hesu rundferð hevur fingið nýggjan íbástur til javnstøðuøkið.

Spurningarnir frá spyrjaranum eru hesir:

- Hvussu gongst við ætlanunum um at leingja barnsburðarfarloyvið upp í 1 ár?

- Og er nøkur ætlan um pápakvotu ella annað áhugavert sum fremur



*Bergtóra H. Joensen vil vita, hvussu gongst við ætlanunum um at leingja barnsburðarfarloyvið upp í 1 ár, sum Landsstýrið hevur lovað í samgonguskjalinum*

## 11 mans funnu ikki songina

**Ikki færri enn 11 mans funnu ikki heim í songina sjálvir hetta vikuskiftið. Bæði í Havn, í Eysturoynni og í Klaksvík mátti politiið fáa fullar mans til hús.**

POLITI
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Um tað er tí at taxabilarnir eru vorðnir ov dýrir, ella tað bara er lættari at preia ein politibil, sigur søgan onki um.

Ikki færri enn 11 mans vóru so dýrandi fullir hetta vikuskiftið, at teir funnu ikki heim í songina sjálvir. Tí mátti politiið fáa teir upp á beinini aftur og koyra teir til hús. Hetta var bæði í Havn, í Eysturoynni og í Klaksvík.

- Vit vilja helst ikki hava hesar fullu menninar inn á støðina at sova. Tað brúka vit meira til teir, sum eisini eru óðir og harðligir. Tí royna vit altíð at fáa somikið av lív í teir, at vit kunnu koyra teir heim til sín sjálvs, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn við Portalin.

Hann fortelur eisini, at tað ofta hendir, at rúsaðu menninir liggja onkrastaðni og sova, og hýruvognarnir skilliga ikki vilja hava teir upp í bilin. Tí verður politiið boðsent.



*Perlulív hjá drykkjumonnum – at verða koyrdur heim av løgregluni*

# Ferðslukaos er rætta orðið

**Tað hava verið so nógv brot á ferðslulógina um vikuskiftið, at vit hava valt at brúka yvirskriftina: ferðslukaos**

POLITI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Døgnrapportin á politistøðini leggur fyri fríggjadagin seinnapart, har ein lastbilur misti eina last av mold á vegin, tá hann fór av Hvítanesvegnum niðan á Ringvegin.

Næsta málið er úti við Landavegin, har ein bilur bakkar inn í ein annan. Viðkomandi verður seinni funnin, og tryggingin fær enn eitt mál at avgreiða.

Í rundkoyringini í Kollafirði brýtur ein førari víkiskylduna, tá hann rennur inn í ein bil inni í rundkoyringini. Her verður politiið boðsent, og førarin fær í minsta lagi eitt klipp í kortið.

Eisini hendu tveir skaðar á bilar í sambandi við parkering. Annar í Klaksvík, har tveir bilar koma ímóti hvørjum øðrum, tá teir skulu avstað. Og í Føgrulíð í Havn uppdagar eigarin av einum bili, at onkur hevur rent á hann, meðan hann var perkeraður. Men viðkomandi er tíverri farin av staðnum.

Eina løtu leygardagin vórðu ferðmátingar gjørdar í Vágatunlinum. Tríggir førarar vórðu tiknir, harav tann eini fær eina treytaða frádøming av kortinum, tí hann koyrdi 125 km/t.

Í Hovstunlinum fekk ein førari eisini klipp í kortið, tí hann yvirhálaði inni í tunlinum.

Um 2-tíðina leygarnáttina varð ein maður tikin fyri at koyra ávirkaður í Havn. Hann hevði heldur onki koyrikort, tí tað var longu tikið.

Á Hjalla var útsøla í gjár, og proppur kom í ferðsluna har. Tí mátti politiið niðan at loysa fløkjuna.

Men bilarnir fingu heldur ikki altíð frið at standa. Í Vestmanna hevur onkur skrætt nummarplátur av bilum, rukka og blaka tær frá sær. Og á Tvøroyri var eldur í einum bili.



*Døgnrapportin á politistøðini er á tremur við lógarbrotum á ferðsluøkinum um vikuskiftið*